# Ísland sum fyrimynd

Í samband við mentanardagin setti Jógvan á Lakjuni tiltakið. Í røðu síni segði hann m.a.:

- Fyri føroyingar er Ísland fyrimyndin á mongum økjum. Eitt fólk og ein tjóð, virkin á altjóða leikpallinum – tað veri seg vinnuliga eins væl og mentanarliga og listaliga. Sum íslendsk skøld vóru gitin í fornari tíð um øll Norðurlond, gera íslendsk listafólk seg nú galdandi innan tónlist, filmslist, bókmentir og myndlist um allan heim.

- Sum vit síggja tað, er hetta, sum vit nevna alheimsgerðin, ikki komin niður yvir íslendingar sum snarljós av heiðum himli og enn minni sum ein skelkur, men harafturímóti sum enn ein møguleiki hjá eini tjóð, sum í roynd og veru altíð hevur verið opin mótvegis umheiminum, og sum leingi hevur havt dirvi og førleikar at virka í altjóða høpi.

- Jú, víst hava vit okkurt at læra av brøðratjóðini fyri vestan. Men frændatjóðin kann kanska eisini læra nakað av okkum – tað er nakað, sum kundi bent á hetta, nú talað verður um eina føroyabylgju av áhuga – og vælvild mótvegis Føroyum og føroyskum listafólkum í Íslandi. So eg fari at vera so ósmæðin at siga, at vit hava heldur ikki so lítið at geva Íslandi og hinum norðurlendsku brøðratjóðum okkara, og tað vilja vit fegin.

- Tjóðirnar í Útnorði hava leingi havt gott samstarv, og er Ísland mangan drívmegin í hesum samstarvi. "Hví skal alt ljósið í landsuðri liggja?" spurdi ein av okkara mætastu mentamonnum fyri meira enn stórthundrað árum síðan. Vit føroyingar mugu venja okkum til at hyggja runt alla havsbrúnna – ikki minst nú avbjóðingarnar, men eisini møguleikarnir, frá einum alsamt minkandi heimi gerast størri og størri.

- Lat okkum taka móti avbjóðingunum í góðum samstarvi við grannarnar í Útnorði. Tað gevur megi og møguleikar. Vit, sum liva undir somu náttúrugivnu fortreytum, mugu samstarva, hóast vit á mongum økjum eru kappingarneytar. Tað vil altíð vera meira sum bindur enn, sum skilur, segði Jógvan á Lakjuni m.a. í talu sínari.

# Samstarva um felags sjónleik í 2009

**Tað gekk ikki long tíð til fyrsta uppskotið til samstarv millum føroyingar og íslendingar kom á borðið. Dagin eftir undirskrivingina av Hoyvíks-avtaluni er eitt útkast gjørt til samstarv millum tjóðpallarnar báðar**

MENTANARSAMSTARV
*Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

p 11**Føroyar-Ísland:** - Eitt felags leikverk sum íslendingar og føroyingar skriva, og har fólk úr báðum londunum eru á palli og aftanfyri pallin í 2009?

Hetta ljóðar sum ein dreymur, men hetta kann kortini gerast veruleiki, um eitt uppskot til eina trý ára samstarvsavtalu millum Íslendska Tjóðleikhúsið og Tjóðpall Føroya gerst veruleiki.

Uppskotið varð lagt fram á einum mentunartiltaki, sum íslendska uttanríkisráðið skipað fyri hósdagin. Tað var stjórin í íslendska tjóðpallinum, Tinna Gunnlaugsdóttir, sum legði hetta fram.

Við til framførsluna vóru bæði politikkarar, mentafólk og onnur áhugað. Og tað var ikki frítt, at hetta uppskotið fekk góða undirtøku millum fólk.



*Hans Tórgarð lesur upp stuttsøgu, sum íslendski uttanríkisráðharrin, Davíð Oddsson hevur skrivað og Carl Johan Jensen hevur týtt*

Spurningurin er - sum ikki einaferð - um peningur kann játtast. Henda spurningin fer m.a. Jógvan á Lakjuni at fáa um stutta tíð, í starvi sínum sum landsstýrismaður í mentamálum.

Í øllum førum verður her lagt upp til eitt sera forvitnisligt og spennandi samstarv, sum bæði londini fara at fáa stóra gleði av.

Gongst sum ætlað kemur avtalan í gildi á nýggjárinum og er í gildi til á sumri 2009.

## Íblástur

Í útkastinum til hetta trý ára samstarvið verður sagt, at føroysku myndugleikarnir skulu gjalda eina ávísa upphædd og teir íslendsku ein aðra.

Skotið verður upp, at íslendingar skulu lata dupult so nógv í stuðli til samstarvið sum teir føroysku. Einki verður tó nevnt um upphædd.

Umframt hesa fíggingina so skulu bæði leikhúsini eisini søkja stuðul frá stovnum og privatum virkjum, og skal hetta tvífalda upphæddina, sum tey hava bundið seg til at gjalda.

Hetta er tann fíggjarligi parturin, men tann mentanarligi parturin leggur eisini upp til eitt sera gevandi samstarv.

Her verður m.a. sagt, at leikhúsini skulu vitja hvørt annað á hvørjum ári við einum av leikum sínum. Somuleiðis skulu gestaarbeiðarar frá hvørjum palli vitja á hinum staðnum, fyri at geva íblástur til víðari útbúgving og menning innan leiklistina.

Í triðja samstarvsárinum verður gjørt eitt felags leikverk sum dramatikari, leikstjóri, leikarar, scenografur ella ljóð- og ljósteknikari frá báðum londunum skapa og framleiða.



*Tinna Gunnlaugsdóttir legði fram spennandi ætlan um samstarv innan leiklist millum Føroyar og Ísland*

# Góð avtala – men hon kostar

**Jógvan á Lakjuni hevði ikki hoyrt um hesa avtaluna fyrrenn á mentanartiltakinum hósdagin. Hann fer nú at kanna hana nærri**

SAMSTARV
*Snorri Brend*

**Játtan:** - Henda avtalan er góð, men vit mugu nú fyrst viðgera hana!

Jógvan á Lakjuni er altíð fegin, tá fólk koma við góðum hugskotum. Hansara trupulleiki er bert, at flestu teirra kosta pening. Tað ger hetta útkastið til samstarv á leikhúsøkinum millum Føroyar og Ísland eisini.

- Eg veit ikki, hvat íslendingar vilja lata. So hetta má alt kannast nærri, sigur hann við Sosialin, beint eftir at kunnað varð um avtaluna.



*- Hetta er ein góð avtala, men hon kostar pening, sigur Jógvan á Lakjuni. Høgrumegin sæt Maria Ellingsen, sum er ein av fólkunum handan íslendska leikin "Ulfhamssaga"*

## Nógv at læra

Fyri ein landsstýrismann í mentamálum er altíð gott at tað hendir nakað í hansara málsøki – eisini innan leiklistarligt samstarv millum tvey lond.

- Hetta átti eisini at verið á øðrum økjum. Og her hava vit nógv at læra av íslendingum, sigur hann.

Hann torir kortini illa at lova nakran pening til eina slíka ætlan. Men hann vil hinvegin als ikki forða fyri ella steðga einum slíkum samstarvi.

Næsta útspælið verður tí helst tað at báðir partarnir fara at seta seg saman at tosa nærri um hesa spennandi avtaluna.